Stu›ul til rentuútrei›slur

Í 1996 var› gjørt av, at stu›ulin til rentuútrei›slur skuldi lækka frá 48 til 40% árini 2001 til 2003. Hans Pauli Strøm og Marjus Dam, løgtingsmenn, halda ikki tí›ina vera búna› til hesa lækking enn

RENTUSTU‹UL
Eirikur Lindenskov

– Seinasta ári› hava føroysku húsarhaldini veri› fyri sera stórum útrei›sluhækkingum. Oljuútrei›slurnar eru hækka›ar ógvisliga, og ta› er stórur prísvøkstur á vørum og tænastum, sum húsarhaldini hava dagligan tørv á. Eisini eru sethúsaútrei›slurnar øktar nógv, og størri eru í væntu. Hetta siga tingmenninir, Hans Pauli Strøm og Marjus Dam sum vegna Javna›arflokkin og Sambandsflokkin hava lagt fyri tingi› uppskot um stu›ul til rentuútrei›slur.

– Tá ta› sn‡r seg um vi›urskiftini hjá familjum, sum sita í egnum sethúsum, eru serliga f‡ra vi›urskifti at nevna, siga tingmenninir:

- Rentan á 1. ve›rættarlánum hjá peningastovnunum er hækka› úr 5,25% upp í 6,50%, tvs. vi› 1,25%-stigum. Og á ø›rum ve›rættarlánum er rentan hækka› úr 7,50% upp í 9,25%, tvs. vi› 1,75%-stigum.
- Húsalánsgrunnurin hevur veri› kroystur at fylgja hinum peningastovnunum og seta rentuna naka› upp eisini, hóast hann ikki hev›i ta› fyri ney›ini.
- Eftir avtalu millum peningastovnarnar noy›ast sethúsaeigarar nú at hava ein munandi størri part av sínum lánum sum seriulán, har ta› mesta á›ur hevur veri› annuitetslán vi› føstum mána›arligum gjaldi. Vi› seriulánum merkjast rentuhækkingar beinanvegin og vi› fullari ávirkan í mána›arliga gjaldi›.
- Og fyri ta› fjór›a skal rentustu›ulin eftir galdandi lóg setast ni›ur úr 48% ni›ur í 44% nú 1. januar 2000, og seinni stigvíst ni›ur í 40%.

Hans Pauli Strøm og Marjus Dam vísa á, at hesi vi›urskifti fara at hækka mána›arligu útrei›slurnar hjá føroysku húsarhaldunum vi› fleiri hundra›tals krónum, hjá summum 500 krónur og ø›rum yvir 1000 kr meir um mána›in. Serstakliga fer ta› at sví›a hjá ungum barnafamiljum, sum júst eru tey, sum bæ›i sita vi› teim størstu húsarhaldskostna›unum og teimum størstu lánunum.

Ta› hevur vanliga veri› politikkur hjá øllum flokkum á tingi at stu›la familjuni eins og tí einstaka at seta føtur undir egi› bor›. Her hevur rentufrádráttur og seinni rentustu›ul veri› n‡ttur til óbeinlei›is at stu›la familjunum til at útvega sær egnan bústa›. Somulei›is hava fólk, i› eftir lokna útbúgving standa vi› lestrarskuld, veri› undir skipanini.

Upprunaliga var eingin avmarking í rentufrádráttinum, hann var› n‡ttur til ymisk endamál, so sum til alskyns n‡tslulán, til bilkeyp og mangt anna›. Og í 80'unum var› rentufrádrátturin eisini ein av fyritreytunum fyri ótálma›ari spekulasjón í muninum millum føroyska og útlendska innláns- og útlánsrentu, vísa teir bá›ir tingmenninir á.

Sí›st í 80-unum gjørdist greitt fyri øllum, at ikki var› rætt at stu›la hesi gongdini, og endiliga í 1990 var› semja um fremja lógarbroytingar í rentufrádráttinum, so hann hereftir bara kom at fevna um:

- sethúsalán
- lestrarlán
- lán til innfríing av ve›haldi.



Hans Pauli Strøm og Marjus Dam hava lagt uppskot fyri tini›um ikki at lækka rentustu›ulin

Rentufrádrátturin var› tá lækka›ur frá 42 til 40 %. Í samband vi› sethúsaloysnina í 1996 var› rentustu›ulin fyribils hækka›ur upp aftur í 48% og skuldi eftir nærri ásettum reglum (§ 5 í hesi lóg) lækka aftur ni›ur í 40% ár 2003, fyrstu fer› 1. januar 2001, tá hann skal lækkast ni›ur í 44%.

Í 1996 var› rentufrádrátturin samstundis í smbandi vi› bruttoskattaskipanina broyttur til eina útgjaldsskipan, rentustu›ulsskipanina, i› var álei› fíggjarliga neutral fyri brúkaran.

Verandi uppskot leggur upp til, at ætla›a minkingin í rentustu›linum ikki ver›ur sett í verk, ásannandi, at ein slík skerjing í rentustu›linum fer at tyngja uppaftur meir um hjá teimum, i› longu í dag hava ta› sera tungt, orsaka› av tí stóra taki, ta› er at sita í egnum húsum. Ta› er hartil serliga óheppi› at skerja rentustu›ulin, samstundis sum rentustigi› er hækka› og møguliga fer longur upp, og annars stórur prísvøkstur er á vørum og tænastum, sum húsarhaldini hava dagligan tørv á.

Somulei›is ver›ur skoti› upp, at upphæddin, sum tann prosentvísi rentustu›ulin ver›ur rokna›ur av, ver›ur sett til 120.000 kr. Sum nú er, ver›ur rentustu›ul í fyrsta lagi veittur av eini rentuupphædd upp til kr. 60.000 árliga. Men er rentuútrei›slan oman fyri kr. 60.000, kann rentustu›ul játtast eftir umsókn av eini upphædd til í mesta lagi kr. 120.000 árliga. Sum skilst standast óney›ugir trupulleikar, bæ›i fyri sethúsaeigararnar og fyri umsitingina, tá komi› ver›ur upp um lofti› upp á kr. 60.000, serliga tá umsókn um hækkan av loftinum upp um 60.000 bara er ein avgrei›sluspurningur. Tí er ta› ein umsitingarlig einfaldgering at broyta lógina so, at ta› ver›ur sett eitt hægstamark, og at hetta ver›ur núverandi hægstamark upp á kr. 120.000.

Karsten Hansen í jólah‡ri

Landsst‡risma›urin í fíggjarmálum mælir nú løgtinginum til at lætta um skattatr‡sti › á lág- og mi›alinntøkunum frá 1. januar

SKATTALÆTTI
Magnus Dam

Karsten Hansen, landsst‡risma›ur í fíggjarmálum, er umsí›ir sinna›ur at lata skattaborgaran sleppa eitt sindur bíligari. T‡sdagin leg›i hann fram uppskot um skattalætta, sum í tveimum umførum minkar um skattatr‡sti› og gevur løntakarunum nakrar túsund krónur meira at liva fyri um ári›.

Skattalættin kemur fyrst og fremst lág- og mi›alinntøkunum til gó›ar. Skattaprosentini fyri tr‡ tey ni›astu stigini í skattastiganum ver›a lækka› naka› yvir tvey ár, og harumframt ver›ur botnfrádrátturin í lands- og kommunuskattinum hækka›ur. Botnfrádrátturin hækkar í fyrsta umfari› 2.000 krónur 1. januar næsta ár – úr 17.000 upp í 19.000 krónur. Og galdandi frá 1. januar 2002 hækkar hann aftur 2000 krónur – upp í 21.000 krónur. Uppskoti› broytir eisini inntøkumarki› í skattastiganum, sum á›ur var 140.-000 krónur, upp í 150.000 krónur.

Lítil ivi er um, at uppskoti› um skattalætta ver›ur samtykt í løgtinginum. Andstø›an hevur til fán‡tis roynt seg vi› uppskotum um skattalætta, men tey vór›u ikki samtykt, tí samgongan sjálv arbeiddi vi› einum uppskoti um skattalætta. Fólkaflokkurin hevur leingi strongt á Karsten Hansen at leggja uppskot fram um skattalætta, og tí er sannlíkt, at uppskoti› hjá Karsten Hansen ver›ur samtykt.

50 milliónir næsta ár

Uppskoti› um skattalætta fær ikki ávirkan á pengapungin uppundir jól í ár, men næsta ár eru kanska útlit til eitt sindur d‡rari jólagávur. Tilsamans fáa skattaborgararnir umlei› 50 milliónir krónur meira at brúka næsta ár, og í 2002 hækkar hendan upphæddin 31 milliónir krónur. Landskassin fær umlei› 37 milliónir minni inn í skatti næsta ár orsaka› av uppskotinum, og kommunurnar fáa umlei› 13 milliónir minni í kassan.

Í 2002 minkar skattainntøkan hjá landskassanum 18 milliónir krónur afturat, og hjá kommununum kostar uppskoti› 13 milliónir afturat í 2002. Sæ› yvir tvey ár fáa landskassin og kommunurnar 131 milliónir krónur minni í inntøku, men naka› fer uttan iva inn aftur í landskassan orsaka› av øktari n‡tslu.

Landsst‡risma›urin í fíggjarmálum vónar eisini, at uppskoti› um skattalætta fer at elva til minni lønarvøkstur, tá i› sáttmálasamrá›ingar ver›a aftur næsta ár.

Í vi›merkingunum til uppskoti› sigur Karsten Hansen, at endamáli› er at minka um lønartr‡sti› komandi árini, so hetta ikki elvir til útholing av reallønini, prísvøkstur og inflasjón. Tí›in vil so vísa, um hetta er nóg miki› til at fáa fakfeløgini at slaka uppá lønarkrøvini.

Vi›bót til ávísar pensjónistar

POLITIKKUR
Eirikur Lindenskov



Kristian Magnussen leg›i t‡sdagin fyri tingi› uppskot um broyting í løgtingslóg um vi›bót til ávísr pensjónistar v. fl.

Javna›arflokkurin heldur, at ney›ugt er at gera ymsar broytingar í lógini um vi›bót til ávísar pensjónistar, sigur Kristian Magnussen í vi›merkingum til uppskoti›. Hann vísir eisini á, at lógin upprunaliga var ætla› sum ein vi›bót til teir pensjónistar, i› líti› og einki anna› hava enn pensjónina at liva av.

– Hetta er enn endamáli›, men lógin ásetir, at ávís upphædd, i› ver›ur ásett í kunnger›, ver›ur útgoldin tríggjar fer›ir um ári›. Upprunaliga var upphæddin ætla› sum stu›ul til útrei›slur av brenniolju og seinni eisini til útrei›slur til útvarps- og sjónvarpsgjald, sigur hann.

Javna›arflokkurin skj‡tur tí upp, at upphæddin ver›ur hækka› solei›is, at hon samanlagt ver›ur 6.000 krónur fyri komandi ár. Hetta er ein hækking upp á 2.613 krónur til hvønn av teimum umlei› 3.900 pensjónistunum, i› væntandi ver›a fevndir av lógini í ár. Kostna›urin av hækkingini ver›ur mettur til umlei› 10 mió.kr. í 2001. Henda upphædd ver›ur at seta á fíggjarløgtingslógina fyri 2001. Hetta kann hóskandi ver›a gjørt sum broyting til uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 2001.

Kristian Magnussen sigur, at hann í mars í ár leg›i eitt tílíkt uppskot sum hetta fyri tingi› vegna Javna›arflokkin. Men samgongan tók ikki undir vi› uppskotinum tá.

– Men nú hevur so landsst‡risma›urin í fíggjarmálum tann 5. desember 2000 bo›a› frá í svari upp á skrivligan fyrispurning á løgtingi, at hann hevur broytt hugsan og nú tekur undir vi›, at júst henda vi›bót til ávísar pensjónistar ver›ur hækka›.

Til tess at tryggja pensjónistum at teir veruliga kunnu fáa hesa hækking í vi›bótini, sum nú bæ›i andstø›a og samgonga taka undir vi›, ver›ur uppskoti› lagt fram.

Bergtakandi

Frá vinstru. Ey›un Poulsen frá Smyril Line, sum tekur sær av bíleggingum og ø›rum í sambandi vi› túrarnar, Birgir Enni, skipari á Nor›l‡sinum og Kristian Blak frá plátufelagnum Tutl. Á bor›inum er turka›ur tari til gestirnar

Mynd: Jens Kr. Vang

Tutl gav t‡sdagin enn eina fløgu út. Hetta eru upptøkur gjørdar úti í holum í Nólsoy og Hesti vi› dananum Karsten Vogel. Fólk hava havt møguleika at fara til hesar konsertir vi› sluppini Nor›l‡sinum. Fløgan nevnist "Light When Dark"

FLØGUÚTGÁVA
Stefan í Skorini

Tú hoyrir sjógvin í bakgrundini, og tú fært eina kenslu av, at tú ert úti á havinum.

So blæsur Kartsten Vogel í ljó›føri, saksofonina, og tú ver›ur tikin til ein annan heim. Í helli úti í Nólsoy ella Hesti.

Afturljó›i› er so gott, at ta› tekur umlei› fimtan sekund frá tí at tónin er farin úr ljó›førinum, til hann er tagna›ur.

»Bergtakand« var or›i›, sum ein bla›ma›ur á Sosialinum n‡tti um konsert, hann hev›i veri› til í eini holu úti í Hesti í summar, har ein hev›i spælt á saksofon. Nú fløgan hevur ligi› í fløguspælaranum, kann ein bara geva bla›manninum rætt í, at ta› er bergtakandi.

Bert harmiligt, at ein sjálvur ikki hevur veri› vi› Nor›l‡sinum ein túr har úti og uppliva› hetta fyribrigdi. Ta› ver›ur næsta summar, tá byrja› ver›ur aftur.

Ta› hevur víst seg, at hesir túrar vi› Nor›l‡sinum hava veri› sera væl dámdir av útlendskum fer›afólki og ikki minst føroyingum.

Birgir Enni, sum er skipari á Nor›l‡sinum, sigur, at ta› er mangan, at fólk standa vi› tárum í eygunum, eftir at hoyrt Vogel spælt.

Vi› tara

Tá fløgan var› løgd fram fyri fjølmi›lunum var› bor›reitt vi› turka›um tara fyri at seta ein serligan dám á, me›an fløgan ljóma›i gjøgnum hátalararnar.

Upptøkurnar eru gjørdar 22. og 29. mai í ár, og ta› er Kartni Fornagar›, sum hevur sta›i› fyri upptøkunum. Kristian Blak frá Tutl og Kartsen Vogel hava sta›i› fyri framlei›sluni av fløguni.

Vogel hevur sjálvur gjørt tólv av teimum fjúrtan løgunum á fløguni.

Kristian Blak sigur, at tey hava havt sera gó›ar royndir vi› slíkum fløgum. Í 1998 var ein líknandi fløga givin út, og hon er seld í næstan 2000 eintøkum.

Hetta er ikki fyrstu fer›, at upptøkur hava veri› gjørdar í holum og hellum í Føroyum. Í 1984 var› pláta givin út, sum var› tikin upp í einum helli á Sandoynni. Hesin eitt sindur ø›rvísi mátin at gera tónleik hevur vakt ans í Evropa, og Kristian Blak sigur, at fleiri av teimum stóru blø›unum hava skriva› um konsertirnar.

Álvur Áarstein, stjóri á Veri-Con:

– Misvísandi samanbering av kostna›inum

Álvur Áarstein, stjóri á Veri-Con, er misnøgdur vi › gongdina í málinum um høllina í Hoyvík. Hann heldur, at b‡rá›i› hev›i ikki sloppi› undan ø›rum útrei›slum, sjálvt um tiki› var› av tilbo ›num frá KJ Smí› uppá 9,8 milliónir

HØLL Í HOYVÍK
Stefan í Skorini

Veri-Con hevur havt um hendi at projektera høllina og hevur eisini innstilla› fyritøkurnar, sum hava sent tilbo› inn.

Í samrø›u vi› Álv Áarstein sigur hann seg harmast almiki›, at fólk hava kunna› fingi› ta fatan, at Veri-Con hevur fingi› eina sams‡ning uppá 17% fyri projekteringina. Hesum vísir hann aftur og sigur, at hon er bara ein lítil partur av hesum.

Fyritøkan KJ Smí› er misnøgd vi›, at teir ikki hava fingi› jør›, kloakk og betong arbei›i›, tí teir ikki eru limir í Meistarafelagnum, hóast fyritøkan hev›i lægsta tilbo›i›.

Álvur Áarstein heldur hinvegin, at máli› hevur tiki› eina skeiva vend.

– Eftir lisitatiónina gjørdu vit ta fyrstu innstillingina. Í tí sambandi vendu vit okkum til Meistarafelagi› fyri at fáa teirra vi›merkingar um fyritøkurnar. Teir uppl‡stu okkum, hvør var limur í Meistarafelagnum, og eingin, sum ikki var limur, var› innstilla›ur, sigur Álvur Áarstein.

Hetta var› gjørt, tí um eitt felag, sum ikki er limur í Meistarafelagnum, fekk arbei›i›, høvdu hini ikki kunna› arbeitt á sama arbei›splássi.

– Ta› stendur ikki beinlei›is í reglunum, at tilbo›sgevarin skal vera limur, men vit kunnu ikki mæla b‡rá›num til at fara í eina ósemju vi› Meistarafelagi›, sigur Álvur.

Álvur sigur, at tr‡ feløg vóru ikki limir, og tey vór›u ikki innstilla›. Sí›ani hevur Veri-Con ikki gjørt meira vi› máli›. Hesi tr‡ feløgini høvdu øll lægsta tilbo›i› fyri okkurt av arbei›unum.

Ta› hevur víst seg sí›ani, at onkur av hesum fyritøkunum, sum ikki var á limalistanum hjá Meistarafelagnum, hevur tekna› seg sum lim aftaná og fingi› vi›urskiftini í rættlag.

KJ Smí› vísir tó á, at annar av monnunum í fyritøkuni, Jóni Durhuus, er limur, me›an hin, Kristen Johansen, ikki er limur.

– Ta› var bara Kristen Johansen, sum var› átekna›ur á tilbo›i›, sigur Álvur Áarstein.

– Sjálvt um b‡rá›i› hev›i tiki› av tí samla›a tilbo›num hjá KJ Smí› uppá 9,8 milliónir, hev›i ta› ikki sloppi› undan ø›rum útrei›slum í sambandi vi› arbei›i›, sigur Álvur Áarstein.

– Eg harmist um, at vi›ger›in av málinum ikki hevur veri› nøktandi fyri okkara part og í onkrum føri beinlei›is misvísandi.

– Ta› er fullkomiliga burturvi› at ákæra okkum fyri at gera avtalur vi› a›rar arbei›stakarar fyri at fáa ein »størri bita av køkuni«, sum tiki› ver›ur til í greinini, sigur Álvur Áarstein.

Víst ver›ur á, at projektering og eftirlit er sáttmálabundi› til ein fastan prís.